

www.oljan.fo

**Jan Müller** 25 - 10 - 2012

# PetroChallenge Føroyar í dag og morgin

Alt meðan bíðað verður eftir úrslitinum av Brugdan 2 leitibrunninum, eru 135 miðnámsskúlanæmingar á Kambsdali og í Havn á PetroChallenge skeiði, har tey leita eftir olju í lærisimuleringini OilSim. Næmingarnir eru í 37 bólkum, og hvør bólkur er eitt oljufelag. Avbjóðingin er at finna olju ella gass í rakstrarverdum nøgdum, og hetta verður gjørt við at keypa og granska umhvørviskanningar, magnetiskar kanningar, tyngdakraftskanningar, seismiskar kanningar, umframt at bjóða uppá leitiloyvi, seta í verk sosialar verkætlanir, gera íløgur í onnur leitiloyvi, bora leitibrunnar og granska úrslitini av brunnunum. Høvuðsendamálið við skeiðinum er at styrkja um fatanina hjá miðnámsskúlanæmingum av oljuvinnuni og hvørjir arbeiðs- og útbúgvingarmøguleikar eru. Lærarar á teimum báðum handilsskúlunum og Føroya Studentaskúla og HF-skeiði hava verið á vegleiðaraskeiði, og tey leiða PetroChallenge skeiðið 25. og 26. oktober á teimum trimum skúlunum. Skeiðið endar við eini kapping, har málið er at finna mesta virðið av olju og gassi. Vinnandi bólkurin umboðar Føroyar í altjóða PetroChallenge finaluni í London í januar. Hetta er 10. ferðin síðani 2002, at skipað verður fyri PetroChallenge skeiði á føroyskum miðnámsskúlum. Statoil stuðlar PetroChallenge Føroyar, sum er fyriskipað av Simprentis í samstarvi við FOÍB. Til ber at fylgja við gongdini í PetroChallenge Føroyar á Twitter og á Facebook, og úrslitið verður tøkt her á oljan.fo, tá skeiðið er liðugt fríggjadagin 26. oktober kl 15. Mynd - Seismikkur verður kannaður í OilSim